# Georg Stage á Vestmanna

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin upp í andøvsgul av landsynningi og regn. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrst fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig. Út á seinnapartin upp í ein strúk av landsynningi og regn.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og æl-ingur, men eisini sólglottar. Hitin mánadagin um 12 stig, men týsdagin kaldari.

**Danska skúlaskipið Georg Stage, sum í nakrar dagar hevur ligið á Vestmanna, fer til Havnar í dag og verður liggjandi um vikuskiftið**



### SKIPSVITJAN

Seinasta leygardag fingu vestmenningar forkunnuga vitjan, tá danska skúlaskipið Georg Stage ankraði upp á firðinum.

Ætlanin var annars ikki, at skipið skuldi koma til Føroya fyrr enn nú í vikuni, men ferðin gekk nógv skjótari enn væntað, og so varð avgjørtat fara at leggja seg á Vestmanna at »slappa av«.

Ikki so galið hjá teimum, sum dáma at síggja slík skip, tí nógv fólk hevur ferðast fram við umborð á Ternuni á veg til og úr Vágum, umframt øll tey, sum hava eygleitt skipið av landi.

Og so fingu teir 63 næmingarnir saman við yvirmonnunum umborð eisini tað upplivilsið, at ein grind legði beinini, meðan skipið lá á Vestmanna.

Georg Stage skal eftir ætlan koma til Havnar í dag og verður liggjandi til mánadagin.

Georg Stage er fullriggari, sum smíðaður er í Frederikshavn í 1935. Hann kann hava 65 næmingar umborð. Skipið er merkt 281 bruttotons og hevur við fullari seglføring 860 fermetrar av seglum uppi.

Hóast seglskip er, hevur tað eisini maskinu, um enn ikki so stóra. Ein 200 hk Alpha Diesel av tí góða, gamla slagnum, stendur í skipinum.

Tað hava nógvir føroyingar verið næmingar umborð á Georg Stage, og ivaleyst er onkur, sum hevur, ella fer, at fríska gomul minni uppaftur, nú skipið er í Føroyum.

*ej*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 11 |
| Halifax | 28 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 21 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 18 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 28 |
| Athen | – |
| Malta | 30 |
| Tunis | 38 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 31 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1001 hPa. við Skotland fer í landnyrðing, meðan eitt annað lágtrýst, 995 hPa. á 49N-32V fer móti Hebridunum. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.




Lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing, men ein lítil hátrýstryggur kemur aftaná og verður væntandi yvir Føroyum sunnunáttina.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/06 kl. 06[00]–28/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,2°
Minsti hiti máldur í juni 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,9 mm – mált frá 27/06 kl. 06[00]–28/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 44,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

23. juni: Mánin næstur jørðini
28. juni: Fyrra kvarter
5. juli: Fullmáni
9. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 29. juni | 02.12 | 14.48 | 01.12 | 13.48 | 01.27 | 14.03 | 04.12 | 16.48 | 05.12 | 17.48 | 00.27 | 13.03 | — | 12.03 | 02.27 | 15.03 | 03.27 | 16.03 | 01.57 | 14.33 | 03.12 | 15.48 |
| 30. juni | 03.24 | 15.47 | 02.24 | 14.47 | 02.39 | 15.02 | 05.24 | 17.47 | 06.24 | 18.47 | 01.39 | 14.02 | 00.39 | 13.02 | 03.39 | 16.02 | 04.39 | 17.02 | 03.09 | 15.32 | 04.24 | 16.47 |
| 1. juli | 04.10 | 16.33 | 03.10 | 15.33 | 03.25 | 15.48 | 06.10 | 18.33 | 07.10 | 19.33 | 02.25 | 14.48 | 01.25 | 13.48 | 04.25 | 16.48 | 05.25 | 17.48 | 03.55 | 16.18 | 05.10 | 17.33 |
| 2. juli | 04.57 | 17.21 | 03.57 | 16.21 | 04.12 | 16.36 | 06.57 | 19.21 | 07.57 | 20.21 | 03.12 | 15.36 | 02.12 | 14.36 | 05.12 | 17.36 | 06.12 | 18.36 | 04.42 | 17.06 | 05.57 | 18.21 |

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Landssjúkrahúsið tlf. 311397